VIKUSKIFTI

Nr. 168 | vikuskifti | 4. september 2009 | 83. árgangur

# Kvarta millión fyri ein Ingálv



280.000 krónur skal privatur seljari hava fyri málningin »Trolari« hjá Ingálv av Reyni. Møguligi keyparin heldur ondini

## Óroynd songkvinna tók øll á bóli

Málstrikan MÁLFELAGIÐ

O, tær fúlheitir, hugsaði eg, her stríðist tjóðin fyri at varðveita ein neyðars morgunlestur í nakrar fáar minuttir seint á morgni, og so koma tey ungu við sovorðnum ónæriligheitum. Men tað líkist hesum unga, ikki vilja tey hoyra Guds orð, heldur vilja tey hava hor - og so upp á handan mátan. Hatta, at tað skuldi fyriganga í einum bóli, man vera tað sama sum, at tey hava verið fleiri um tað. Ikki verður upplýst, hvussu nógv blivu tikin í hesum bólinum, men kvinnan hevur neyvan verið so óroynd, sum portalurin vil vera við. Hví ein sovorðin fallin kvinna skal kallast songkvinna, er ein gáta. Gott nokk fyrigongur hatta hundalívið ofta í einari song, men tað ber til aðrastaðni eisini. Fyrr fóru tey út í hoyggjhúsið. Guds orð talar um syndarar og tollarar, og er talan um falnar kvinnur, so verða tær ikki kallaðar songkvinnur ella songarkvinnur, men við nógv ljótari orðum. Eitt gamalt danskt orð er 'bolerske', so her sær mann skyldskapin millum 'ból' og núføroyskt grísarí. Tað kann vera, at tey vóru ómodernað fyrr í tíðini, men tá ið tað kom til tað ósediliga, so var einki í vegin við fantasiini. Eftir er bara at fáa at vita, hvussu nógv vóru í bólinum. Av samanhanginum framgongur, at songkvinnan ordiliga fekk roynt seg, so nú er hon ikki óroynd longur. Annars áttu Sosialurin og Portalurin heldur at lagt doyðin á at fáa okkum ein morgunlestur afturat. Hann kundi til dømis verið um kvøldið, so tey ungu fingu annað at hugsa um enn at hundast og bølast í bóli við songkvinnu.

**(MT)**